Almannamálaráðið

Dagfesting: 22. februar 2021
Mál nr.: 21/00769
Málsviðgjørt: PL

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 22. ... *Stk. 2-7.* ... *Stk. 8.* Barnaverndartænastan ber, eftir umbøn, ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru innanlands. Barnaverndartænastan ber ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru uttanlands, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur.	**§ 1** Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 166 frá 12. desember 2020 verður § 22, stk. 8 orðað soleiðis: "*Stk. 8*. Barnaverndartænastan ber, eftir umbøn, ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru innanlands. Landið ber ferðaútreiðslurnar sum standast av samveru við uppihald á stovni uttanlands."
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 14. desember 2020.